VB–VÍF 18–27 (8–11)

# Eingin steðgar VÍF



*Margreth Augustinussen og Nikolina Eyðbjørnsdóttir stríðast um bóltin. Margreth noyddist annars av vøllin við einum snuddi, tíðliga í seinna hálvleiki*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Hóast dysturin millum fremstu kvinnuliðini í landinum til tíðir var spennandi, so var kenslan eftir dystin, at einki av hinum liðunum fer at skala VÍF hetta kappingarárið**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

So er alt avgjørt. Øðrvísi fær niðurstøðan ikki verið, eftir at kvinnurnar hjá VÍF loystu kanska torførastu uppgávuna á árinum, tá tær vunnu í VB høllini.

Tað var kanska eisini væntandi, at VÍF fór at vinna, men at dysturin í løtum skuldi taka skap av eini styrkisuppvísing frá VÍF, var so avgjørt ikki væntandi.

### Ring VB byrjan

Tá liðini bæði hittust í hálvfinaluni í steypakappingini herfyri, var ein avgerandi lutur, at VB fekk eina út av lagi vánaliga byrjan. Eftir fyrstu minuttirnar sunnudagin var eisini líkt til, at alt skuldi gleppa hjá heimaliðnum. Líka mikið, hvat VB gjørdi, fekk Manuela Stan í málinum vart fyri, og tá Regina so eisini misnýtti brotskast, fór av álvara at síggja svart út hjá VB.

Tað eydnaðist teimum tó at stríða seg inn aftur í dystin, og eina løtu vóru tær eisini framman fyri mótstøðuliðið. Týdningarmesti luturin í VB spælinum tóktist at vera mansverjan, sum tær frá fyrstu løtu løgdu á Ioanu Rápa. Við at halda henni úti, mátti VÍF í øllum førum vera størstu skothóttanina fyri uttan, og tað var eyðsæð, at Guðrun í Lágabø hevði hampuliga gott tak á skotroyndunum frá hinum leikarunum.

### Ov einstáttað

Í álopspartinum gekk sum so eisini á eini leið hjá heimaliðnum hesa løtuna. Tær megnaðu hampuliga væl at pressa spælið upp, soleiðis at VÍF verjan kundi spælast tunn, men stóri trupulleikin var, at tá tær so komu ígjøgnum á veinginum, misnýttu tær alt ov nógvar møguleikar.

Allar helst mundi hetta eisini vera spæliætlanin hjá VÍF. Tað at fáa VB álopini at koyra út á vengurnar. Við Manuelu Stan í málinum, er í øllum føurm meira enn sannlíkt, at møguleikarnar úr spískum verða misnýttir, og í fleiri førum varð hetta revsað við skjótum mótálopum.

VB royndi í løtum at broyta spælið, soleiðis at tær eisini sluppu ígjøgnum mitt fyri, men hetta eydnaðist ongan tíð í nóg stóran mun. Til hetta vóru álopsroyndirnar alt ov einstáttaðar, og krútsterka miðverjan hjá vestmenningum hevði ongar sum helst trupulleikar av at standa seg móti stórum parti av hesum. Einasti leikarin, sum veruliga megnaði at seta seg ígjøgnum verjugarðin, var Andrea Lütz, men einsamøll megnaði hon als ikki at halda liði sínum inni í dystinum.

### Skrædnaði í seinna

Hóast eyðsýndu trupulleikarnar á VB liðnum, so var ikki tann stóri munurin millum liðni bæði, tá farið varð til hálvleiks. VB kom eisini væl við beinan vegin í seinna hálvleiki, men áskoðararnir mundu fáa varhugan av, hvat fór at henda, tá einir fimm minuttir vóru leiktir av seinna hálvleiki.

Fyrst hevði VÍF skorað upp á tvey fylgjandi brotskøst, men tá VB beint eftir hetta fekk sama møguleika, gekk alt galið. Fyrstu royndina misnýtti Andrea, og tá VB so aftur fekk brotskast burtur úr returinum, misnýtti Christina tann møguleikan.

Hetta tók á sín hátt seinastu restina av sjálvsálitið úr VB spælarunum, og nú gekk brádliga skjótt hjá VÍF. Eftir tíggju minuttum høvdu tær økt leiðsluna upp í átta mál, og so var dysturin í roynd og veru avgjørdur. Áskoðarafjøldin vaknaði eitt sindur aftur, tá VB fekk minkað niður í seks mál, men nærri enn tað sama megnaðu tær á heimaliðnum ongan tíð at koma.

### Styrkisuppvísing

Við sigrinum á næst fremsta liðnum ikki bara staðfestu VÍF kvinnurnar, at tær í løtuni eru besta liðið í landinum. Til tíðir var talan um eina sanna styrkisuppvísing, og tað var eisini sjónligt, at tað ikki bert er ein orsøk til, at liðið framvegis hevur status sum ósigrað, nú tríggir fjórðingar av landskappingini eru farnir aftur um bak.

Hóast Ioana at kalla varð tikin úr dystinum við mansverju, so prógvaðu hinar genturnar, at tað so avgjørt ikki bara er rumenski stórskjúttin, sum teirra álit er bygt á. Við Sóley Mikkelsen á odda, varð spælt við bæði breidd og djúpd í álopspartinum, soleiðis at VB ongantíð fann nakran einstakan verjuhátt, sum kundi tippa fyri málskjótanini. Harumframt er liðið, sum nevnt omanfyri, sera sterkt í verjupartinum, har tað nærum er ógjørligt hjá mótstøðuliðunum at berja seg ígjøgnum miðverjuna.

Sterka verjuspælið ger so eisini, at liðið fær fleiri møguleikar fyri skjótálopum, og við útkøstunum hjá Manuelu, skulu mótstøðuliðini vera meira enn vanliga ansin, um tað skal eydnast teimum at steðga hesum partinum av VÍF spælinum.

Heldur ikki breiddin, sum annars hevur tóktst størsti trupulleikin á liðnum, tykist nú at vera nakað, sum kann steðga teimum. At Jacklin kom heim aftur, hevur sjálvandi styrkt um, men eisini Angelie og Óluvá tykjast at hava funnið seg væl til rættis á liðnum, og helst skal meira enn ein ella tveir skaðar til, fyri at gera liðnum nakað álvarsligt mein.

Sostatt tykist einasti spurnignurin restina av árinum at vera, hvørt tað skal eydnast VÍF at fara ósigraðar ígjøgnum árið, og sum støðan er í løtuni, er hetta kanska heldur ikki nakar spurningur. Tað er snøgt sagt upp tær sjálvar, tí taka tær komandi uppgávurnar í álvara, er lítið sannlíkt, at nakað annað lið kemur í nær námind oddaliðnum úr Vestmanna.

### Dysturin í tølum

**Málkskjúttar:**
VB: Andrea Lütz 7(2), Regina Radó 6, Mary Krosslá 3, Gurið Mortensen 1, Eydis Kjærbo 1
VÍF: Sóley Mikkelsen 9(3), Nikolina Eyðbjørnsdóttir 5, Fríða Marjunardóttir 4, Angelie Jógvansdóttir 3, Alis Høghamar 3, Ioana Rápa 2, Jacklin Durhuus 1
Brotskøst: VB 5, VÍF 4
Útvísingar: VB 1, VÍF 2
Dómarar úr H71: Petur S. Dahl og Bárður Brimvík. Einir tveir dómar tóktust at fáa ilt í vágbingar, menyvir høvur høvdu teir eitt sera gott tak á dystinum, og fyri tað mesta tóktust leikararnir eisini at nýta orkuna upp á hondbóltin heldur enn dómararnar.



*Ioana Rápa í eini heldur sjáldsamari roynd móti VB málinum. Allan dystin á tamb varð hon mansvard, so alt í alt varð bert talan um tvey mál frá henni í dystinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



Kyndil–Neistin 22–24 (12–12)

# Neistin nærkast heiðursmerkjum

**Neistakvinnurnar vunnu væntaða sigurin móti Kyndli, men avrikið hjá teimum grønu var eitt hitt besta í fleiri dystum, og kundi væl hvat kastað stig av sær**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Sum gongdin hevur verið hjá liðunum báðum síðani vetrarsteðgin, var einki at ivast í, at tað var Neistin, sum var favorittur at vinna lokaluppgerðina móti Kyndli sunudagin.

Kyndil hevur at kalla bert havt mótgongd hesa tíðina, og í fleiri dystum hava avrikini verið merkt av máttloysi, soleiðis at leikararnir als ikki hava tókst verið til reiðar, til at offra tað, sum krevst til at vinna.

Neistin hevur hinvegin rættiliga havt viðgongd hesa tíðina. Afturkoman hjá Katrin á Neystabø hevur økt munandi um skothóttanina, og sigurin móti Stjørnuni fyrr í vikuni bendi eisini á, at viljin til at vinna so avgjørt er til staðar hjá teimum bláu.

### Eingin løtt uppgáva

Tað gjørdist tó skjótt greitt, at talan ikki á nakran hátt fór at gerast um nakra lætta uppgávu hjá neistakvinnunum sunnudagin.

Kyndil byrjaði frá fyrsta bríksli at mansverja Katrina á Neystabø, og tað var eyðsæð, at hetta ikki hóvaði neistaliðnum. Á máltalvuni hildu tær grønu eisini alla tíðina sambandið við bláu grannarnar, og í løtum vóru tað eisini Kyndil, sum høvdu munin.

Javnleikur var framvegis, tá farið varð til seinna hálvlek, men nú tóktist kortini, sum um Neistin hevði vunnið sær eitt avgerandi yvirtak. Eitt skifti vóru tær eisini á odda við fýra málum, men seinastu løtuna fór aftur at styttast millum liðini, tó at Kyndil so ikki kom nærri enn teimum tveimum málunum, sum vóru á muni, tá alt var liðugt.

### Dia hjálpti til

Ein av kyndilsleikarunum, sum var á vøllinum hendan dystin, var Erla Smith, sum annars eisini hevði sín 30 ára føðingardag sunnudagin.

Hóast hon sjálvandi var nakað vónsvikin av tapinum, so var hon væl nøgd um tann vilja, sum leikararnir høvdu sýnt í dystinum sunnudagin.

– Í mun til aðrar dystir, sum vit hava spælt í ár, so vóru fleiri lutir, sum riggaðu betri hesaferð, enn teir hava gjørt áður. Serliga seinastu fimm-10 minuttirnar riggaði væl hjá okkum, men tað eydnaðist okkum tíverri ikki at vinna tær aftur.

– Tað gjørdi sjálvandi mun, at vit beinan vegin fóru út eftir Katrin, men vit royndu eisini alla tíðina at dekka sera offensivt, og tað haldi eg órógvaði spælið hjá Neistanum sera nógv. Hetta krevur sjálvandi nógva orku, men eisini her eru vit nú vær betri fyri, enn vit vóru beint eftir vetrarsteðgin, sigur Erla, sum annars eisini legði dent á, at málverjarnir hjá liðnum stóu seg heilt væl í dystinum.

– Tað, sum gjørdi størsta munin, var tó helst, at vit til hendan dystin høvdu fingið Dia Midjord til at sita á beinkinum, soleiðis at vit fingu meira hjálp har frá. Leikluturin hjá Lotte sum spælandi venjara er jú ógvuliga torførur, tí tá skal hon bæði hugsað um egna spælið og okkara spæl í senn. Tað er jú sera torført at fylgja nóg væl við hesum, tá mann sjálv spælir, og har umframt kundi Lotte eisini spæla nógv meira frígjørt í dag, enn hon hevur gjørt í undanfarnu dystunum.

Hóast hon ikki dugir at siga, hvørt Dia verður við liðnum til komandi dystirnar, so týkjast vónirnar hjá Kyndli um fleiri stig als ikki so kámar nú, sum tær hava verið. Tá vit at enda spyrja Erlu, um hon roknar við eini betri úrtøku komandi dystirnar, sýnir svarið eisini, at sjálvsálitið á leikarum nú tykist batnað mundandi.

– Tað skulu vit altíð rokna við, tá vit fara á vøllin. At tað so ikki riggar hvørja ferð, er ein onnur søga, men vit fara so altíð eftir tveimum stigum, sigur hon at enda.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
Kyndil: Jórun Ludvig 6(1), Lotte Sørensen 5(2), Ann Hansen 4(1), Óluva Dalsgaard 3(1), Erla Smith 2, Anita Kjørbo 1, Jensia Petersen 1
Neistin: Súna Mørk 6, Katrin á Neystabø 5(1), Annika Thomsen 5(3), Ata Høgnadóttir 3, Mildrid Jacobsen 2, Birita Wardum 2, Susan Brockie 1
Brotskøst: Kyndil 6, Neistin 5
Útvísingar: Kyndil 3, Neistin 4
Dómarar úr Kyndli/Neistanum: Hanus Kúrberg og Kristian Johansen

Kyndil–Neistin 23–22 (13–11)

# Kyndil gjørdi uppgávuna torføra

**Hóast Kyndil var liðið, sum hevði greiða yvirvág í spæli og møguleikum, so gjørdist talan um ein sera spennandi dyst móti Neistanum sunnudagin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Talan var um tvey lið, sum bæði ætla sær sær heiðursmerki í ár, sum hittust uppi á Hálsi sunnudagin. Bæði Neistin og Kyndil hava alt árið hildið til uppi móti bronsu- og silvurmerkjunum, og nú kappingin nærkast endanum, var tí líkt til, at talan skuldi gerast um ein sera avgerandi dyst millum liðni bæði.

Tað var tó nær við, at dysturin varð av ongum, tí nógvi kavin, sum hevur veirð kring landið, hótti við at útseta dystin, tí ásettu dómararnir ikki høvdu møguleika at koma. Trupulleikin varð tó loystur, soleiðis at Hanus Kúrberg úr Kyndli og Kristian Johansen úr Neistanum vórðu settir at døma, og sum skilt á teimum, sum vóru vitni til dystin, komu teir báðir væl frá uppgávuni.

Tað var eisini skjótt, at blóðið gjørdist heitt á leikarunum, tí talan var at kalla alla tíðina um ein javnan dyst, har báðir partarnir gjørdi alt teir vóru mentir, til tess at vinna dystin.

Longu eftir18 minuttum varð fyrstu ferð farið í reyvalumman eftir reyða kortinum, tá dómararnir mettu, at Janus Einar Sørensen royndi at hevna seg inn á Kára Mortensen, og fram móti endanum av dystinum, varð Hans Áki Dal Christiansen rikin av vølli fyri triðju ferð, soleiðis at eisini hann fekk reytt kort.

Sum sagt, so var talan alla tiðina um ein javnan dyst. Sum skilst, var talan tó ikki um tað heilt poleraða hondbóltsspælið. Viðvirkandi til hetta var eisini, at Neistin frá fyrsta bríksli fór sera langt út at verja, og serliga vóru tað Bjarna Wardum og Jónleif Sólsker, sum teir løgdu seg eftir.

Tað var tó í stórum pørtum av dystinum líkt til, at tað skuldi gerast Kyndil, sum fór avstað við sigrinum. Eftir útvísingina av Janus Einari fingu teir fatur á rætta endanum, og tá farið varð til hálvleiks, høvdu teir vunnið sær eina tvey mála stóra leiðslu.

### Brendu ov nógv

Seinna umfarið hótti Kyndil beinan vegin við at rýma frá teimum bláu, men hvørja ferð teir høvdu møguleikan, so misnýttu kyndilsmenn.

Uttan at nevna nøkur nøvn, frættist, at oknur av spælarunum hjá Kyndli átti at fari undir skotvenjing komandi vikurnar, ti ltess at tryggja, at slíkir málmøguleikar ikki verða misnýttir aftur. Tað tærnir sjálvsagt eisini til rós fyri neistamálverjarnar, Levi og Lars, at kyndilsmenn høvdu so stórar trupulleikar av at skora, men fyrst og fermst verður sagt av Hálsi, at skotryndirnar ikki vóru nóg neyvar.

### Neistin misti møgueikan

Orsakað av mongu misnýttu málmøguleikunum, hekk Neistin í Kyndli fram til seinastu løtu av dystinum, tá Hanus Jensen við einasta málinum hjá sær, avgjørdi dsytin við máli til 23-21. At Neistin skoraði eina ferð afturat, hevði lítið og einki at siga, og so kundu kyndilsmenn fegnast um, at teir aftur tykjast at hava fingið yvirtakið á grannunum.

Við tapinum má Neistin roknast fyri at vera úti í dystinum um heiðursmerki. Í øllum førum í fyrstu atløgu, nú teir ikki kunnu røkka hinum liðunum eftir einum leikdegi. Nógv kann tó framvegis henda seinastu seks dystirnar, men at síggja til tók Kyndil eitt avgerandi fet frá Neistanum sunudagin.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
Kyndil: Bjarni Wardum 9(5), Jónleif Sólsker 6, Hans Áki Dal Christiansen 3, Heini Bendtsen 2, Uni Wardum 2, Hanus JEnsen 1
Neistin: Jacob Jónsson 7, Ræni Slættanes 4, Kári Mortensen 3(1), Áki Mørk 3, Rune Møller 2, Ári Rouch 2, Ragnar Zachariasen 1
Brotskøst: Kyndil 5, Neistin 1
Útvísingar: Kyndil 7, Neistin 8
Diskvalifikatiónir: Kyndil 2 (Eitt beinleiðis reytt og eina ferð 3X2 minuttir)



*Hans Áki Dal Christiansen mátti seimastu løtuna sita á beinkinum, meðan liðfelagarnir stríddust við at toga sigurin móti Neistanum heim*